


# Ulf flýddi und

Sum nýklaktur studentur í Norðurtýsklandi flýddi hann undan leivdum nazismunnar. Burtur frá týskum trongskygni og út til størri frælsi. Í 1974 gjørdust Føroyar hansara heim, og í samrøðu við Sosialin hugleiðir týski málsnillingurin Ulf Timmermann m.a. um ágangandi 68-ættarliðið í Hoydølum, einum serføroyskum stórabeiggja-kompleksi, sínum heldur øðrvísi áhuga fyri navnafrøði og um avleiðingarnar av Seinna veraldarbardaga



*- Lívið í Týsklandi eftir kríggið var sera nógv ávirkað av tíðarskeiðnum undir Adolfi Hitler, og hetta var ein av orsøkunum til, burtur frá týskum trongskygni og út til meiri frælsi, sigur 64 ára gamli týskarin Ulf Timmermann, sum hevur búð og undirvíst*

**ÚTLENDINGURIN**
*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*

Í 1959 valdi ein 18 ára gamal týskur drongur at fara til Føroya at vitja í summarfrítíðini. Avgerðin um at fara til Føroya í nakrar vikur skyldaðist hansara stóra áhuga fyri smærri oyggjum og oyggjabólkum. Einsamallur fór hann umborð á Tjaldri og legði avstað norðureftir til lítlu Føroyar, sum hann lítið og einki visti um frammanundan. Sigurd Simonsen, táverandi leiðari á Kunningarstovuni, beindi fremmanda unglingan í fyrsta umfari til Mykinesar.

## Ófriðarlig hippie-tíð

Lítið varnaðist ungi týskarin afturi í 1959, at ferð hansara til fjarskotnu oyggjarnar var byrjanin til eina gongd, sum skuldi koma at mynda og broyta hansara lív. Drongurin æt Ulf Timmermann, og í dag, 46 ár eftir hansara fyrstu ferð í Norðuratlantshavi, hevur hann búð í Føroyum í 31 ár og er vorðin ein sonn legenda fyri allar teir túsundtals næmingar, sum hann hevur undirvíst í latíni og týskum á Studentaskúlanum í Hoydølum.

- Sjálvur eri eg uppvaksin á eini lítlari oyggj í Norðsjónum við navninum Föhr 20 kilometrar sunnanfyri danska markið, sum er eitt sindur minni enn Sandoyggin. Haðani stavaði mín áhugi fyri oyggjasamfeløgum. Á mínum túri í 1959 hitti eg ein mann við navninum Christian Haraldsen, sum tá var lærari í týskum í Hoydølum, og vit fingu beinanvegin gott samband við hvønn annan. Vit hildu sambandið við líka eftir mína fyrstu ferð í Føroyum, og eg vitjaði aftur í sekstiárunum. Í 1974, beint áðrenn hann skuldi fara frá fyri aldur, spurdi hann meg, um eg var sinnaður at koma at undirvísa eini tvey ár í týskum í Hoydølum. Eg, sum tá var giftur til Svøríkis og hevði undirvíst á miðnámsskúlum har, segði ja til tilboðið, og hetta var so byrjanin til mítt lív í Føroyum, greiðir 64 ára gamli Ulf Timmermann frá, tá vit hitta hann í heimi hansara í Eysturbýnum í Havn.

Ulf sigur, at tey seinast í sjeytiárunum keyptu húsini hjá hesum sama Christiani Haraldsen, og síðani tá hava tey havt tað somikið gott í Føroyum, at hetta eftir øllum at døma gjørdist teirra endastatión. Men hvussu var tað so at koma til Føroya og niðan á Studentaskúlan í Hoydølum miðskeiðis í sjeytiárunum?

- 70´ini var eitt sera órøligt tíðarskeið. Uppreistrarsinnaða 68-ættarliðið var í hæddini. Stemningurin kundi mangan vera ágangandi, og við tað at eg var føddur afturi í 1941, var eg tá vaksin frá hesum ráki. Eg minnist serliga, tá kinesiski leiðarin Mao Zedong doyði í 1976, júst meðan eg tók pedagogikum á miðnámsskúla niðri í Roskilde. Allur skúlin, bæði lærarar og næmingar, savnaðust og høvdu minningarhald um hendan hópdrápsmannin. Í dag er hetta jú langt úti at hugsa sær, minnist Ulf Timmermann aftur. Hann leggur afturat, at málstríðið í Hoydølum eisini liggur frammarlaga í hansara minni. Hetta snúði seg um, at næmingar mótmæltu, at prógvtøkurnar gingu fyri seg á donskum.

Men stóð Ulf Timmermann so í andsøgn til ágangandi 68´ararnar?

- Nei. Eg havi ongantíð verið politiskt engageraður og taki sum heild frástøðu frá øllum politiskum slagorðum. Eg meti, at menniskju, sum gerast virkin á politiska økinum ella geva til kennar sínar politisku sannføringar, missa á ein ella annan hátt sítt frælsi. Tey verða beinanvegin bólkaði og ákærd fyri at renna politisk ørindi, hvørjaferð tey úttala seg, og tí havi eg hildið meg burtur frá hesum, sigur Ulf.

- So alt í alt var talan um eina ófriðarliga tíð, minnist Ulf aftur.

## Doktari í navnafrøði

Hóast ein á dialektini væl hoyrir, at Ulf er útlendingur, gerst tú skjótt varur við, at maðurin ikki ger eitt einasta málsligt mistak, meðan hann tosar. Áhugin hjá Ulf Timmermann hevur eisini verið á málsliga økinum, og hetta sæst aftur í akademisku yrkisleið hansara. Hann hevur lisið latín, grikskt og germansk mál við universitetinum í Keypmannahavn, Lund og Uppsala í Svøríki, og hevur hann latín og týskt sum høvuðsfak frá Uppsala. Í 1998 gjørdist hann doktari í Keypmannahavn, við einari dr. phil. ritgerð, sum snúði seg um eitt so óvanligt evni sum norðurlendsk fólkanøvn á frísiskum øki. Sambært Ulf var orsøkin til hetta ein stórur áhugi fyri navnafrøðini.

Í løtuni er málsnillingurin í gongd við eina føroysk-týska orðabók, og verður hetta tann fyrsta av sínum slagi í Føroyum. Við góðari hjálp frá Jóan Hendriki Winther Poulsen og Hanusi Samuelsen situr Ulf dagliga og arbeiðir, og handritið til nýggju orðabókina skal eftir ætlan latast Mentamálaráðnum um nýggjársskiftið.

- Um peningur er tøkur, vóni eg, at orðabókin kemur út um eitt ár ella so, sigur Ulf Timmermann um hansara núverandi verkætlan, sum hevur havt við sær, at hann ikki hevur undirvíst á Studentaskúlanum seinasta árið, men fingið stuðul frá landinum fyri sítt arbeiði við orðabókini.

Umframt sítt lærarastarv, sína doktararitgerð og sína orðabók luttekur Ulf javnan við greinum í útlendskum akademiskum tíðarritum. Hann greiðir frá, at hann

## CV

Ulf Arnold Timmermann
Føddur í 1941 í Kiel, Týskland
Uppvaksin á norðurfrísisku oynni Föhr
Studentur á Föhr í 1960
fil.kand. í Uppsala í Svøríki í 1966 í týskum og latíni
Studentaskúlalærari á svenskum miðnámsskúlum frá 1966-68
Ph.D.-lesandi í Uppsala frá 1968
Studentaskúlalærari í Hoydølum frá 1974
dr.phil. í Keypmannahavn í 1998
Giftur í 1972
Fýra børn í aldrinum frá 21-29 ár